Kambsdalur 8/11 2022

Hoyringsskriv til uppskot til løgtingslóg um bókasøvn (Bókasavnslógin)

Miðnám á Kambsdali heilsar sum heild nýggju lógini um bókasøvn vælkomnari.

Okkara hoyringsskriv fer mest at snúgva seg um partin, sum viðvíkur skúlabókasøvnum.

Fyrst ein viðmerking til §4, har ásett verður, at landsstýrismaðurin skipar eitt bókasavnsráð til at ráðgeva politisku skipanini í bókasavnspolitiskum málum: Her fara vit at heita á myndugleikan um at skipa so fyri, at skúlabókavørðir á miðnámi innstilla lim/-ir til ráðið. Hetta tí, at uppgávan hjá skúlabókasavninum á miðnámi ikki er eins háttað og tann á fólkabókasavni og skúlabókasavni í fólkaskúlunum, men fylgir neyvt arbeiðinum við lógum, kunngerðum, námsætlanum og sáttmála á miðnámsskúlaøkinum. Og tað er alneyðugt, at eitt slíkt ráð hevur gott innlit í hetta útbúgvingarøkið, sum er stórt. Harafturat vilja vil vera partur av tí forumi, sum innstillar ein slíkan ráðslim, t.e. at ikki ein tilvildarligur miðnámsskúli fær í boði at innstilla til ráðið.

Síðani til §11: Vit taka undir við týdningarmiklu ásetingunum um, at bókasavn skal vera á skúlum og við uppgávuni, sum hon er lýst í stk. 1, og er hetta í tráð við tað, sum okkara bókavørðir gera í dag.

Til stk 3 hava vit ta viðmerking, at okkara bókasøvn hava longu gott samstarv við Landsbókasavn og fólkabókasøvn, og vilja ávara ímóti, at ásetingin "Skúlabókasøvn kunnu verða skipað saman við einum fólkabókasavni ella ein skúlabókasavni í einum øðrum skúla" fer at kunna nýtast sum ein tvingandi regla ímóti viljanum og tørvinum hjá t.d. okkara skúla. Um hetta er týdningurin, so taka vit ikki undir við ásetingini í stk.3.

Til § 13, so hóvar okkum væl, at reglan um at bókasøvn skulu vera á miðnámsskúlum og yrkisskúlum. Tá tað kemur til stk 2, so vilja vit hava ávirkan á, hvussu tær nærri reglurnar fyri bókasøvn okkara verða.

Sum samanfatandi viðmerking, so vilja vit varðveita skipanina, sum hon er, har bókavørðir skúlans eru undirvísarar og starvsfólk á skúla okkara, tí hervið fáa vit ráðlagt bókasavnsvirksemið neyvt í tráð við okkara árskalendara, við krøvini í undirvísingini, og við og fáa tryggjað, at tað eru undirvísarar við neyvum og dagførdum innliti í arbeiðsgongdir og krøv til skúlaarbeiðið á miðnámi og neyvari á okkara skúla. Sum dømi kann nevnast, at vit nýta í løtuni undirvísarar í teimum stóru ritgerðarlærugreinunum: føroyskum, donskum, enskum og søgu til bókavørðir og vegleiðarar til fjølbroyttu avbjóðingina. Og hesa eru ella verða javnan førleikament til at røkja uppgávuna. Og slíka loysn vilja vit halda fast við.

Vinaliga

Hanna Jensen, rektari

MIÐNÁM Á KAMBSDALI
KAMBSDAL COLLEGE